

*Malena Thomsen situr longst til vinstru. Her situr hon og prátar við fólk á hátíðarhaldinum*

## Barnagarðurin ikki langtíðar loysn

**Borgarstjórin í Sjóvar Kommunu, Malena Thomsen, fegnast um nýggja barnagarðin. Hann er tó longu fullur, og tí er tørvurin ikki stillaður langt fram í tíðina, sigur hon**

STRENDUR
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Malena Thomsen, borgarstjóri í Sjóvar Kommunu, var til hátíðarhaldið. Hon fegnast sum vera man um, at nýggi barnagarðurin er tikin í brúk.

– Vit eru væl nøgd við arbeiðið. Fólk sýna eisini stóran áhuga fyro barnagarðinum. Her eru foreldur, ommur og abbar og børn, sum skulu ganga her, sigur Malena.

**Tørvurin einans fyribils stillaður**

Tað hevur verið stórur tørvur á einum barnagarði, tí at tað eru so nógv børn á Strondum. Hóast hesin stóri barnagarðurin júst er tikin í brúk, er tørvurin tó ikki stillaður langt fram í tíðina.

– Barnagarðurin er longu fullur. Vit hava tó eina frítíðarstovu, og tá ið tørvurin verður størri, má hon fara út, sigur hon.

Tey uppliva ein stóran vøkstur á Strondum. Tað er gravgangur eftir grundstykkjunum.

– Tað standa 63 fólk á bíðilista. Ein stórur partur av hesum eru úr Havnini. Tað er ein stórur áhugi fyri at búgva her, og vit fara at gera okkara fyri at nøkta hendan eftirspurningin, sigur Malena at enda.

# Lítli Fløttur

**Leygardagin varð nýggi barnagarðurin á Strondum tikin í nýtslu. Sera nógv fólk komu inn at hyggja at flottu hølunum til hátíðarhaldið. Navnið á nýggja barnagarðinum er "Lítli Fløttur"**

STRENDUR
*Orð & myndir: Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Leygardagin var hátíðarhald í nýggja barnagarðinum á Strondum í samband við, at hann er tikin í nýtslu. Hátíðarhaldið byrjaði klokkan 14, og fólk hildu á inntil klokkan 17. Á hátíðarhaldinum var navnið á nýggja barnagarðinum avdúkað. Tað varð útskrivað ein kapping um navnið, og tað var Anna Joensen, sum átti vinandi uppskotið. Hon fekk ein kekk og eitt blómutyssi á hátíðarhaldinum.

Huglagið á fólki, sum vóru komin til hátíðarhaldi var sera gott. Í matstovuni var borð við ábiti. Í horninum sat ein ungur dugnaligur klaverspælari og spældi vakran kafétónleik, meðan fólk prátaðu yvir ein bita.

Hans Petur Jacobsen, formaður í trivnaðarnevndini í Sjóvar Kommunu, segði nøkur orð á hátíðarhaldinum. Malena Thomsen var eisini til hátíðarhaldið. Tey vóru øll væl nøgd við bygningin.

Hvør stova fekk sítt egna navn í barnagarðinum. Í bygninginum skal vera vøggustova, barnagarður og frítíðarstova. Barnagarðurin liggur einans eitt hanagleiv frá fótbóltsvøllinum á Strondum, so har kann væntast, at børnini fara at nýta nógva tíð.

Tað er Fjarðahús, sum hevur bygt barnagarðin. Barnagarðurin í Vestmanna er nýttur sum fyrimynd, og tað meta tey vera ein fyrimunur.

- Vit hava spurt vestmenningar, hvat vit kunnu brúka frá teimum, og hvat vit kanska burdu gjørt ørðvísi, Soleiðis hava vit notið gott av teirra royndum, sigur Tummas Johannesen, formaður í teknisku nevnd í Sjóvar Kommunu.

Øll starvsfólkini vóru til hátíðarhaldið. Tey vóru í góðum lag, og tey stillaðu fegin upp til myndatøku. Har vóru eisini ommur og abbar og foreldur við børnum, sum skulu ganga í barnagarðinum. Sum heild tykist tað sum, at tað eru nógv, sum koma at njóta ágóðan av nýggja barnagarðinum.






*Hesin ungi drongurin spældi frálíkan kafé-tónleik, meðan fólk fingu sær ein bita*

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!